## Fara at kæra

Hóast teir enn hava nýggju dagar at umhugsa dómin frá FIFA, so staðfestir Chelsea longu nú, at felagið ikki uttan víðari vil góðtaka revsingina. – Revsingin er uttan fordømi í fótbóltssøguni og fullkomuliga uttan proportiónir í mun til brotið, stendur millum annað á heimasíðuni hjá Chelsea. Heilt uttan fordømi er revsingin tó ikki. Í 2005 fekk italska Roma eitt ára transfer-bann, tá teir ikki bóru seg heilt rætt at, tá teir keyptu Philippe Mexes frá franska Auxerre.



## Transfer bann í 16 mánaðir

FIFA hevur gjørt av, at Chelsea ikki sleppur at keypa nakran nýggjan spælara fyrr enn í januar mánaði 2011. Hetta hendir, tí ein úrskurður nú staðfestur, at Chelsea hevur lokkað 18 ára gamla Gael Kakuta at bróta sáttmála sín við Lens, soleiðis at hann kundi skifta til Chelsea. Spælarin sjálvur hevur fingið eina bót á 780.000 eurur, og hann sleppur ikki at spæla nakran skrásettan dyst næstu fýra mánaðirnar.

# Hagtølini tala fyri okkum

**Tað er sjáldan, at vit spla móti einum landi, har tað stendur á jøvnum í hagtølunum, sigur Jákup Mikkelsen, sum saman við liðfeløgunum vónar, at tey hagtølini framvegis halda, tá dysturin leygarkvøldið er av**




**Jákup Mørk**

Hóast avloysarin stendur klárur og trippar, so er neyvan nakar ivi um, at Jákup Mikkelsen aftur hesa ferð verjir føroyska málið.

Málverjin og landsliðsskiparin er mest royndi spælarin á føroyska liðnum, og hann gleðir seg til uppgávuna, sum má metast sum partur av niðurteljingini hjá honum á landsliðnum.

- Eg eri spentur upp á uppgávuna. Tað er sjáldan, at vit møta einum liði, sum hava jøvn hagtøl ímóti. Sjálvandi eru teir favorittar, og fara at leggja stórt trýst á okkum, men hinvegin hava vit staðið okkum væl í hesi kappingini, og tað vænti eg eisini, at vit framvegis koma at gera.

- Vit hava kanska ikki skora so nógv, sum vit sjálvir vildu ynskt. Men vit hava skapt nógvar møguleikar hesar seinstu dystirnar, og vit hava ikki givið mótstøðuni eins nógvar møguleikar. So fyribils haldi eg, at vit kunnu vera væl nøgdir við hesa undankappingina, men tað krevur sjálvandi, at vit halda fram í sama lag, og tað ætla vit okkum eisini at gera, sigur Jákup Mikkelsen.

Hóast tú vart í landsliðsmyndini tá, so vart tú ikki partur av liðnum í Landskrona-dystinum, og tú vart heldur ikki við í Salzburg í fyrstu undankappingini. Hvussu er kenslan, nú tú 19 ár seinni stendur her í Graz?

- Sjálvandi er tað ein serlig kensla. Øll í Føroyum minnast jú, hvat tey gjørdu tann 12. september í 1990, tí hatta er eitt avrik, sum vit ongan tíð gloyma.

- Sjálvur eri eg eisini stoltur av, at eg enn havi møguleikan at vera við, og vit liva í vónini um, at eisini vit kunnu skapa tí heilt stóru sensatiónina. Eg haldi eisini, at vit gjørdu tað so hampuliga gott, tá vit spældu javnleik á Tórsvølli í fjør. Sjálvandi kann tað illa sammetast við úrslitið í Landskrona á sinni, men vónandi verður tað so leygardagin, sigur Jákup Mikkelsen.



**Jákup Mikkelsen kann nú telja á aðrari hondini, hvussu nógvir landsdystir eru eftir. 2009 verður definitivt seinasta landsliðsárið, sigur málverjin, sum nú eisini er liðskipari**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Mugu hugsa um okkara spæl

**Fróði Benjaminsen heldur ikki, at føroyska liðið kann brúka tað til nakað, at talan er um skert mótstøðulið**




**Jákup Mørk**

Tit spældu 1-1 móti Eysturríki í Føroyum. Hvussu eru tit fyri, nú tit skulu royna tykkum á útivølli móti teimum?

- Eg haldi, at vit hava fingið nøkur góð úrslit í seinastuni, og spælið er eisini byrjað at koyra nakað nógv betur. So eg haldi, at vit eru væl fyri. Men tað er sjálvandi einki at ivast í, at tað er ein torførur dystur, sum vit skulu spæla.

Eysturríkar hava hug at undirdríva um sínar egnu, og nógv tos snýr seg um ein meðalaldur upp á bara 24 ár, og at fleiri lyklaspælarar ikki eru tøkir. Er tað nakað, sum ávirkar tykkum?

- Nei, tað fáa vit ikki brúkt til so nógv. Eg veit sjálvandi, at teir hava skift nógv út í mun til dystin, sum vit spældu móti teimum seinast, og júst tað úrslitið hevði kanska sína ávirkan á tað. Og tað er sjálvndi nakað, sum teir ikki vilja endurtaka.

Talan er hesa ferð um fyrsta útidystin, síðani Brian Kerr tók við. Verður tað øðrvísi enn hinir báðir dystirnar, sum hava verið á heimavølli?

- Tað er tað sjálvandi. Men tað ræður framvegis um hjá okkum, at vit mugu gera alt tað, sum vit kunnu gera, so tað er tað, sum vit royna at hugsa um, sigur Fróði Benjaminsen.

# Fantastiskt at vera við

**Levi Hanssen var ikki meira enn føddur, tá hetjurnar í Landskrona vunnu sín sigur á Eysturríki. Sjálvur hevur hann droymt um landsliðsúttøku í eina tíð, og nú er tann dreymurin veruleiki**




**Jákup Mørk**

Levi Hanssen fekk nakrar minuttir, tá landsliðið í vár vann venjingardystin móti Íslandi, men í aðrar mátar er hann óskrivað blað á føroyska A-landsliðnum í fótbólti.

- Tað at vera við nú er heilt fantastiskt. Tað er sjálvandi nakað, sum mann hevur droymt um nú í eina tíð, so tað er ótrúliga stuttligt at vera blivin partur av hópinum.

- Árið hevur eisini gingið hampuliga væl hjá mær. Sjálvandi eru nøkur ting, sum eg kundi ynskt betri, men sum heild hevur tað verið á eini leið, og so er tað hugaligt, tá tú fært staðfest, at venjarin heldur tað sama, sigur Levi Hanssen.



Hevur tú havt nakað samband við Brian Kerr, soleiðis at tú hevur vitað, at úttøkan var heilt nær?

- Nei, slettis ikki. Men tað havi eg so fingið høvi til er á ferðini.

Eysturríki er væl ein serligur dystur. Eisini hóast tú neyvan minnist, hvussu tað gekk fyri seg, tá Føroyar í 1990 vunnu 1-0 í Landskrona.

- Tað er tað sjálvandi. Hetta er ein dystur, sum alt Føroya fólk gleðir seg til, og sum vekir sterk minni hjá øllum. Vit stóðu okkum eisini væl móti teimum í fjør, so talan er heilt avgjørt um eina spennandi uppgávu, sum vit gleða okkum til.

Og er tað í hesum dystinum og tí næsta móti Litava, at tit veruliga kunnu skapa eitt yvirraskilsi ella tvey?

- Ja, tað er tað væl. Hetta er ein øgilig sterkur bólkur, so skulu vit hava nøkur stig, so skal tað kanska verða í hesum báðum dystunum. Og tað vóni eg sjálvandi eisini, at vit fáa, sigur Levi Hanssen.

**Levi Hanssen heldur tað vera fantastiska stuttligt at vera partur av landsliðshópinum, sum stendur fyri søguligari uppgávu í morgin**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir